# Ikki afturgongd men

**VINNULÍV - Tað eru ikki nógvar sólskinssøgur í hesum døgum. Men alivinnan her í økinum hoyrir til undantakið, og hevði vind í seglunum í fjør. Og í ár eru vónirnar eisini góðar, sigur Sune Jacobsen, borgarstjóri í Sørvágs kommunu. - Tað var ofta trongligt á bryggjuni í fjør**

Snorri Brend

**Sørvágur:** - Hjá okkum er tað sum so manga aðrastaðni: Tá fiskaríið gongur væl, ávirkar tað skjótt virksemið á landi, vísir borgarstjórin á.

Í Sørvági er stórt og væl útgjørt havnarlag, sum er ført fyri at taka sær av øllum tí víttfevnda virkseminum ið finst innan fiskivinnuna.

Virksemið innan hesa vinnuna sæst væl á bryggjuni, har eftirspurningurin eftir vørum og tænastum avspeglast í prísi og nøgd. Eitt dømi um hetta er fiskiskapurin eftir upsa, sum hevur verið stak vánaligur.

- Eitt úrslit av hesum er, at bátar hava ligið við bryggju, tí tað snøgt sagt ikki loysti seg at loysa frá landi. Og støðan gjørdist ikki frægari, tá Fiskavirking fór av knóranum í farna mánaði.

- Tað svitast ikki, at minni eftirspurningur eftir eini vøru plagar at geva minni prís, vísir Sune Jacobsen á. - Vit mugu vóna, at okkurt skilagott reisist úr øskuni, og at tað framvegis fer at bera til at hava fiskivinnu á landi.

Borgarstjórin vísir í ársfrágreiðing síni fyri 2010 á, at annað alternativ til høvuðsvinnuna finst ikki í løtuni, hóast laksavinnan hevur gingið væl, har serliga tann góði prísurin hevur havt eitt gott avkast við sær.

## 9000 tons

Tað hevur, sum nevnt, gingið afturá við fiskivinnuni kring landið hetta farna árið, men soleiðis er ikki í Sørvági.

Nøgdirnar sum Landingarmiðstøðin hevur tikið ímóti hava verið vaksandi ár undan ári - frá 3800 tonsum í 2007 til omanfyri 9000 tons í fjør.

- Bara í november mánaði í fjør tók Landingarmiðstøðin ímóti 540 tonsum. Og er hetta størsta nøgdin sum er farin gjøgnum miðstøðina ein einstakan mánað, vísir Sune Jacobsen á.

Tað eru heldur ikki smáar nøgdir sum farnar eru niðan gjøgnum bygdina - um Blindtarmin, tey siga - í farna árinum. Umframt tey 9000 tonsini frá Landingarmiðstøðini, hevur kryvjivirkið Luna eisini flutt 5000 tons úr bygdini.

Haraftrat hevur Luna flutt 2100 oman í bygdina. Her er talan um alifisk, ið er komin av Gøtuvík og til kryvjingar í Sørvági.

- So hevði Blindtarmurin dugað at tala, so hevði hann sæð 16000 tons farið framvið. Hetta eru ikki smá tøl, tí hetta svarar til 16 prosent av miðal botnfiskaveiðuni undir Føroyum, staðfestir borgarstjórin.

## Inntøkur

Júst Luna er í mangar mátar at meta sum ein sólskinssøga. Í fjør vóru 5100 tons kruvd á hesum virkinum - av teimum komu tey 3000 tonsini av Sørvágsfirði, meðan restin sum nevnt kom av Gøtuvík.

Í ár er ætlanin at kryvja eini 8000 tons - tey fyrstu tonsini av Gøtuvík, og tey seinnu úr Miðvági.

Alt hetta virksemið á sjógvi og landi hevur verið til gagns fyri inntøkurnar hjá kommununi. Hesar vóru í roynd og veru heldur størri enn mett varð eitt ár frammanundan.

Um teir fyrstu 11 mánaðirnir í 2009 og 2010 verða sammettir, so var inntøkan góðar 26,8 mió krónur í 2009, meðan hon í fjør vaks við nærum 1,2 mió krónum, til góðar 28 mió krónur.

- Hetta er ein vøkstur sum svarar til 4,43 prosent, vísir Sune Jacobsen á.

**» Hugskotið er at leggja 5 km av jørðslangu ein metur niður í sandin, haðani ein kann upptaka ta orkuna sum skal nøkta tørvin hjá bæði skúlanum og svimjihøll hansara**



**NÓGVUR FISKUR**

*Hvønn einasta dag fer nógvur fiskur um bryggjuna í Sørvági. Bæði bátar av bygdini og aðrastaðni frá landa her. - Eini 16000 tons komu uppá land í fjør, vísir borgarstjórin, Sune Jacobsen (innfeldur) á*

*Mynd: Jens Kristian Vang*